Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya
Postboks 1376
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
(+298) 21 13 76
www.blf.fo
blf@blf.fo

28. oktober 2020

UMMÆLISSKRIV

viðvíkjandi

Uppskoti til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing (ALS- lógin)
(Norðurlendski sáttmálin um almannatrygd, hækking av arbeiðsloysisstuðli, eftirlønargjald o.a.)

BLF takkar fyri høvið at gera viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.

Víst verður til ummælisskriv, dagfest 29. januar 2020, har BLF hevur gjørt viðmerkingar til fleiri av somu viðurskiftunum, sum eru fevnd av fyriliggjandi uppskoti. Hetta varð gjørt í sambandi við løgtingsmál nr. 77/2019, ið varð lagt fram í løgtinginum í vár, men sum landsstýrismaðurin valdi at taka aftur tann 4. juni 2020.

Í fyrra ummælisskrivinum fegnaðist BLF m.a. um, at tað ber til at fíggja ALS við lægri inngjaldi og hægri útgjaldi. Samstundis varð kortini mælt til at vísa varsemi við broytingum, sum elva til at haldførið hjá skipanini versnar, áðrenn nøktandi greiningar eru gjørdar, so tryggjast kann at skipanin framhaldandi kann vera haldfør. Hetta er serliga týdningarmikið, eftir at ALS-grunnurin í vár hevur rindað fyri lønaríkoytisskipanina, sum skuldi hjálpa privata arbeiðsmarknaðinum í sambandi við avleiðingarnar av koronu.

Sambært ALS-lógini er eitt inngjaldsloft galdandi, soleiðis at tryggingartakarin í mesta lagi kann rinda ALS-gjald av 650 tkr. Eisini er eitt útgjaldsloft, soleiðis at árligi arbeiðsloysisstuðulin í mesta lagi kann vera 210 tkr., sum við útgjaldi á 75% av útrokningargrundarlagnum, svarar til eina ársinntøku á 280 tkr. Hesin stóri ójavni millum inngjaldsloftið og útgjaldsloftið er stórt sæð óbroyttur; eisini hóast útgjaldsloftið verður hækkað til 222 tkr., umframt at eftirlønargjald verður rindað sambært eftirlønarlógini.
Nú broytingar verða gjørdar í reglunum um útgjald, heldur BLF eisini at tíðin er búgvin at eftirmeta javnvágina millum inngjaldsloft og útgjaldsloft.

Vinarliga

Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya